

# Føroya Kærustovnur

## Ársfrágreiðing

## 2013



Ársfrágreiðingin 2013 hjá Føroya Kærustovni
Umbróting og teknindi: C4
Liðugtgerð: www.c4designit.com

# Innihaldsyvirlit

Føroya Kærustovnur | Ársfrágreiðing | 2013


1. Inngangur . . . . . 5
2. Kærustovnurin . . . . . 7
3. Virksemið í 2013 . . . . . 9
4. Kærunevndin í Almanna- og heilsumálum . . . . . 15
5. Skatta- og avgjaldskærunevndin . . . . . 33
6. Kærunevndin hjá Studna . . . . . 41
7. Kærunevndin í Lendismálum . . . . . 47
8. Vinnukærunevndin . . . . . 53
9. Psykiatriska sjúklingakærunevndin . . . . . 67
10. Skuldarumskipanarnevndin . . . . . 71
11. Fjølmiðlanevndin . . . . . 77
12. Heimasíða . . . . . 81



Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn
Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo

# 1. Inngangur

> ...talið av kærum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, er hægri enn undanfarna ár.

Staðfestast kann, at bæði talið av innkomnum og avgreiddum málum vóru færri í 2013 enn undanfarna ár. Tað er einans talið av kærum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, sum er hægri enn undanfarna ár. Á øllum hinum økjunum hevur talið av kærum antin staðið í stað ella er minkað.

Miðal viðgerðartíðirnar hetta árið liggja frá 6 døgum fyri Psykiatrisku sjúklinga-kærunevndina til 7½ mánaða fyri Skuldarumskipanarnevndina og verða mettar at vera á einum nøktandi støði á flestu økjum.

Arbeiðið fyri Fjølmiðlanevndina hevur verið avmarkað til tann partin av fyrireikingini, sum fevnir um skráseting av kærum, innheintan av upplýsingum, innkalling til fundar o.s.fr. Frá 1. februar 2013 hevur Kærustovnurin havt alt skrivstovuhaldið hjá nevndini um hendi, og ger Kærustovnurin nú eisini løgfrøðiligt upprit til nevndina við tilmæli um avgerð. Frágreiðing um virksemið hjá Fjølmiðlanevndini í 2013 er nú eisini at finna í hesum bóklingi.

Kærustovnurin gjørdist partur av Landsneti í februar 2013. Nakað av byrjunartrupulleikum hava verið, men vóna vit, at hetta fer at laga seg.

Lóg um bygging varð sett í gildi 1. apríl 2013, og kunnu avgerðir sambært hesi lóg kærast til Kærunevndina í lendismálum. Enn hevur tó ongin kæra verið innan hetta økið.

Økið hjá Vinnukærunevndini varð í 2013 víðkað til eisini at fevna um avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal. Ongin kæra er komin innan hetta økið enn.

Tórshavn, mars 2014



Anja Hovgaard
stjóri

# 2. Kærustovnurin

Kjarnuuppgávan hjá Føroya Kærustovni er at vera skrivstova hjá kærunevndum, sum viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum.

Fyri tað fyrsta er tað fyrireikingin av málunum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Studna, Kærunevndina í lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku sjúklingakærunevndina, sum stovnurin tekur sær av.

Kærustovnurin tekur sær av skrivstovuvirkseminum hjá nevndunum. Stovnurin móttekur kærurnar, skrásetir tær, sendir tær til ummælis og hoyringar hjá avvarðandi myndugleikum og møguligum triðu pørtum. Tá málið er fult upplýst, verður løgfrøðiligt upprit við tilmæli til niðurstøðu gjørt, og verður hetta saman við skjalatilfarinum í málinum sent nevndarlimunum. Innkallað verður til fundar, og tá kærunevndin hevur tikið avgerð, avgreiðir Kærustovnurin avgerðina til kærara og avvarðandi myndugleika.

Avgerðirnar hjá kærunevndunum verða síðani gjørdar navnleysar og lagdar út á avgerðarsavn á heimasíðu okkara. Eisini tekur stovnurin sær av samsýningini hjá nevndunum og av goymsluni av málunum hjá nevndunum.

Kærustovnurin er eisini skrivstova hjá Fjølmiðlanevndini, sum viðger spurningar, um brot er framt á góðan fjølmiðlasið og um rættin at svara aftur. Hóast talan ikki er um avgerðir hjá almennum myndugleikum, er upplýsingarmannagongdin og fyrireikingin stórt sæð tann sama sum fyri hini málini.

Eisini upplýsir og fyrireikar Kærustovnurin mál um skuldarumskipan til Skuldarumskipanarnevndina at taka støðu í. Hendan nevnd er ikki ein kærunevnd, men tekur støðu til umsóknir frá borgarum um eftirgeving og umskipan av skuld.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið á stovninum er á leið átta fulltíðarstørv. Starvssamansetingin fevnir um stjóra, 3,3 løgfrøðingar, deildarleiðara, 1½ skrivstovufólk og skrivstovulærling.

## Fíggjarviðurskifti

Fíggjarjáttanin hjá Kærustovninum 2013.

| | |
|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan, kr. | 5.645.000 |
| Lønir v.m. kr. | 4.830.000 |
| Keyp av vørum og tænastum, kr. | 383.000 |
| Keyp av útbúnaði, netto, kr. | 60.000 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur, kr. | 372.000 |

Nevndirnar verða samsýntar av játtanini hjá Kærustovninum.

# 3. Virksemið í 2013

## Innkomin mál

Í 2013 móttók Kærustovnurin 279 nýggj mál. Hetta eru 18 færri enn í 2012, tá 297 mál komu inn og 49 færri enn í 2011, tá 328 mál komu inn.

Sum talvan vísir, hevur ein minking verið í innkomna talinum av málum á hvørjum ári síðan 2009. Leggjast skal tó til merkis, at árini 2009 og eisini 2008 vóru serlig á tann hátt, at bæði árini vóru fleiri enn 100 av innkomnu kærunum um mvg á skrásetingargjaldið.

**279**

**Nýggj mál**

Hvønn veg talið av málum fer ber ikki til at siga, og hevur Kærustovnurin ikki ávirkan á, hvussu nógv mál koma inn, men er hetta tengt at, hvussu nógvar og hvørjar avgerðir verða tiknar av teimum myndugleikum, hvørs avgerðir kunnu kærast til tær ymsu nevndirnar.

Tað er bert talið av kærum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, sum er hægri enn árið frammanundan. Málini til Skuldarumskipanarnevndina og Fjølmiðlanevndina eru júst líka nógv sum ári frammanundan. Men á øllum hinum økjunum er talið av kærum lægri enn árið frammanundan. Serliga kann leggjast til merkis, at talið av kærum til Kærunevndina í lendismálum bert er 13 í 2013. Talið var 26 í 2012 og hevur annars ligið á umleið 30 málum í miðal. Her er sostatt ein munandi lækking í kærutalinum.



## Avgreidd mál

Avgreidd eru 260 mál í 2013. Hetta eru munandi færri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 379 og 313 mál vórðu avgreidd. Avgreidda talið av málum er líkt talinum av avgreiddum málum í 2007 og 2008.

**260 avgreidd mál**

Tað er galdandi fyri allar nevndirnar, at avgreidda talið av málum er lægri í 2013 enn undanfarna árið. Talið av avgreiddum málum er tengt at talinum av innkomnum málum, og tá talið av innkomnum málum lækkar, má talið av avgreiddum málum fyrr ella seinni fara sama veg.




## Mál um innlit

Umfram vanligu kærumálini hava nevndirnar viðgjørt umbønir um innlit. Talan kann vera um umbønir um alment innlit frá t.d. fjølmiðlum ella partsinnlit frá pørtum í einum máli.

**9 mál um innlit**

Tilsamans vóru 9 umbønir um innlit viðgjørdar í 2013. Kærunevndin í lendismálum fekk 2 áheitanir um innlit, báðar frá fjølmiðili. Fjølmiðlanevndin fekk 1 áheitan, eisini frá fjølmiðili. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum fekk 2 umbønir um innlit frá pørtum, og Vinnukærunevndin fekk 4 umbønir um innlit, 2 frá fjølmiðlum og 2 frá pørtum.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin er ymisk frá nevnd til nevnd og liggur í 2013 frá 7 døgum fyri Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina til 7½ mánaða fyri Skuldarumskipanarnevndina.

Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin hjá Skuldarumskipanarnevndini er stytt við einum mánaði í 2013 í mun til 2012, og viðgerðartíðin hjá Vinnukærunevndini er stytt við 2 mánaðum. Hinvegin er viðgerðartíðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini og Kærunevndini hjá Studna longd við ½ mánaði, og viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í lendismálum er longd við 3 vikum í mun til 2012. Hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum og Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er miðal viðgerðartíðin stórt sæð tann sama sum undanfarna ár.

Samanumtikið verður mett, at miðal viðgerðartíðirnar á flestu økjum mugu sigast at vera nøktandi hetta árið. Kærustovnurin strembar tó altíð eftir at hava so stutta viðgerðartíð sum gjørligt. Men tað er greitt, at ein miðal viðgerðartíð fyri eitt øki kann vera longri enn fyri annað øki og tó vera nøktandi, tí tað er ymiskt, hvussu langa tíð tað tekur at upplýsa, viðgera og fyrireika málini innan ymsu økini.



## Samskiftið við myndugleikar

Áðrenn mál verða løgd fyri kærunevnd til støðutakan, skal Kærustovnurin vegna nevndina fáa til vega tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at nevndin kann taka avgerð í málinum. Tá Kærustovnurin biður kærda myndugleikan um ummæli, er hetta tí partvís grundað á kravið um hoyring, sum framgongur av fyrisitingarrættinum, og kravið um, at myndugleikin sambært officialprinsippinum hevur skyldu at upplýsa málið.

Kærustovnurin samskiftir soleiðis við nógvar myndugleikar, og sum heild gongur hetta samskiftið væl. Tó skal viðmerkjast, at vit í nógvum førum bert fáa avrit av skjølum í málinum og fáa ikki eina frágreiðing um málið og niðurstøðu hjá myndugleikanum.

Tað kann vera nøktandi bert at fáa avrit av skjølunum. Men í flestu førum hevði tað verið ein avgerandi fyrimunur at fingið eina nærri lýsing av málunum við grundgeving fyri, hví myndugleikin er komin til sína niðurstøðu.

Ofta hevði tað eisini verið ein fyrimunur, um myndugleikarnir fyrihildu seg til innihaldið í kærunum, tvs. viðgjørdu og svaraðu uppá pástandir, sum kærararnir koma við.

Tað skal viðmerkjast, at tað serliga er í førum, har avgerðirnar als ikki ella ikki eru nøktandi grundaðar, at ein frágreiðing frá myndugleikanum hevði hjálpt til at greiða málið. Um kærdu avgerðirnar eru væl grundaðar og lýsa málini nøktandi, er ofta ikki neyðugt við nærri frágreiðing. Tað er tó altíð neyðugt, at myndugleikarnir fyrihalda seg til pástandir, sum kærarar koma við.

## Tað góða ummælið

Tað góða ummælið inniheldur hesar upplýsingar:

- ☐ Generellar upplýsingar um persónin ella virkið, sum málið snýr seg um
- ☐ Lýsing av málsgongdini
- ☐ Lýsing av sjálvum trupulleikanum/spurninginum í málinum
- ☐ Lýsing av lógargrundarlagnum og møguligari siðvenju á økinum
- ☐ Lýsing av avgerðini, herundir niðurstøðuni í málinum, teimum faktisku umstøðum, sum hava havt týdning fyri avgerðina og av metingum, sum eru gjørdar í sambandi við avgerðina
- ☐ Skjøl, sum eru partur av grundarlagnum undir avgerðini
- ☐ Um kærarin hevur ført fram viðmerkingar, sum hava týdning fyri spurningin í málinum, er eisini neyðugt, at myndugleikin ger viðmerkingar til hesar.

# 4. Kærunevndin í almanna- og heilsumálum

## Nevndin

Í Kærunevndini sita:

- Sigmund Poulsen - løgfrøðingur og formaður
- Annika Olsen - lækni
- Karin Kjølbro - sosialráðgevi

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin viðger kærur um avgerðir:

- hjá Almannaverkinum
- hjá Sjúkrahúsverkinum, sum ikki eru um heilsufakligt virksemi
- hjá kommunustýrum um barna- og ungdómstannrøkt
- eftir barnaverndarlógini, sum ikki kunnu kærast til høvuðsbarnaverndarnevndina
- eftir lóg um eldrarøkt á Sandoynni
- hjá Heilsutrygd og tilskotsnevndini eftir lóg um almenna heilsutrygd

## Móttikin mál

**159**

**Nýggj mál**

Í 2013 komu 159 nýggjar kærur til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. Hetta eru væl fleiri enn í 2012, tá einans 139 kærur vóru móttiknar, men nakað færri enn í 2011, tá kærurnar vóru 165 í tali. Kærutalið innan hetta økið er soleiðis hækkað nakað aftur, men er tó lægri enn miðaltalið av kærum til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum seinastu 3 árini, sum hevur verið 169.

Býtið av innkomnum kærum er líkt býtinum undanfarnu tvey árini. Soleiðis eru flestu kærurnar um avgerðir eftir forsorgarlógini. Næstflestar í tali eru kærur um tillutan og hækkan av fyritíðarpensjón. Hesum á baki kemur bólkurin, sum vit kalla fyritíðar- og

fólkapensjónsmál, sum umframt at fevna um persónligt ískoyti, afturgjaldskrøv og aðrar avgerðir eftir almannapensjónslógini, eisini fevnir um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima.




Onkrar broytingar eru í uppgerðini í mun til árini frammanundan. Ein broyting stendst av, at lóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk varð sett í gildi 1. januar 2013, og er nýggjur bólkur í uppgerðini hetta árið. Avgerðirnar, sum hoyra til hendan bólk, hava fyrr verið fevndar av forsorgarlógini.

Kærurnar eftir sjúkrahúslógini vóru 11 í tali í 2013 og soleiðis á sama støði sum bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 12 og 11 kærur vórðu móttiknar.

| | 2011 | 2012 | **2013** |
|---|---|---|---|
| Forsorgarlógin | 56 | 52 | **46** |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (Ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 26 | 14 | **25** |
| Fyritíðarpensjónsmál (Tillutan, hækkan v.m.) | 35 | 36 | **28** |
| Barnaverndarlógin | 2 | 2 | **9** |
| Barnagjaldslógin | 4 | 2 | **6** |
| Dagpeningalógin | 14 | 11 | **14** |
| Nærverkið | 6 | 3 | **-** |
| Sjúkrahúsverkið | 11 | 12 | **11** |
| Heilsutrygd | 1 | 2 | **5** |
| Dagstovnalógin | 5 | 2 | **1** |
| Innlit | - | - | **-** |
| Stuðul til uppihaldspening | 5 | 3 | **1** |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | - | - | **13** |
| **Í alt** | **165** | **139** | **159** |

## Avgreidd mál

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum hevði 12 fundir í 2013 og avgreiddi 143 mál. Talið er væl lægri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 164 og 167 mál vórðu avgreidd. Orsøkin til hetta er, at færri mál eru innkomin.

Tey flestu avgreiddu málini eru eftir forsorgarlógini. Næst í tali eru mál um tillutan og hækkan av fyritíðarpensjón og síðan koma fyritíðar- og fólkapensjónsmálini um ískoyti v.m.

**143**

**Avgreidd mál**

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Forsorgarlógin | 56 | 66 | 43 |
| Fyritíðar- og fólkapensjónsmál (Ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.) | 18 | 28 | 24 |
| Fyritíðarpensjónsmál (Tillutan, hækkan v.m.) | 42 | 28 | 26 |
| Barnaverndarlógin | - | 2 | 11 |
| Barnagjaldslógin | 6 | 2 | 3 |
| Dagpeningalógin | 15 | 15 | 7 |
| Nærverkið | 3 | 5 | - |
| Sjúkrahúsverkið | 18 | 9 | 14 |
| Heilsutrygd | 1 | 1 | 5 |
| Dagstovnalógin | 5 | 3 | 2 |
| Stuðul til uppihaldspening | 3 | 5 | 2 |
| Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk | - | - | 6 |
| **Í alt** | **167** | **164** | **143** |

## Avgreiðslan

Av teimum 143 avgreiddu málunum, var býtið millum myndugleikarnar soleiðis, at Almannaverkið átti 111 mál, Sjúkrahúsverkið 14 mál, kommunurnar 13 mál og Heilsutrygd 5 mál.

Almannastovan og Nærverkið eru løgd saman og verða nú gjørd upp undir einum.




# Almannaverkið

Tey 111 málini hjá Almannaverkinum í 2013 vórðu avgreidd soleiðis:




| | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 74 | 59% | 102 | 74% | 59 | 60% |
| Broytt | 10 | 8% | 8 | 6% | 15 | 15% |
| Heimvíst | 16 | 13% | 9 | 7% | 9 | 9% |
| Burturfallin | 26 | 20% | 18 | 13% | 16 | 16% |
| Avvíst | 2 | | - | | 2 | |
| Kærufreist | 8 | | 7 | | 6 | |
| Uppafturtøka | 3 | | - | | 4 | |
| Steðgandi virknaður | 1 | | - | | - | |
| **Í alt** | **140** | | **144** | | **111** | |

N.B. Í uppgerðini er í mun til % sæð burtur frá avvístum málum, málum um kærufreist, málum um uppafturtøku og málum um steðgandi virknaða. Fyri 2013 er % tí roknað út frá 99 málum.

Verður alt økið hjá Almannaverkinum tikið undir einum sæst, at prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum vórðu staðfestar í 2013, er 60% og harvið munandi lægri enn árið frammanundan, tá prosentparturin av avgerðum, sum vóru staðfestar var 74 %. Prosentparturin av staðfestum avgerðum er á sama støði sum í 2011, tá 59% vóru staðfest.

Prosentparturin av avgerðum hjá Almannaverkinum, sum eru broyttar, er hækkaður munandi í mun til undanfarna árið og er 15% í 2013. Árini frammanundan var prosentparturin av avgerðum, sum vóru broyttar ávikavist 6% í 2012 og 8% í 2011.

Parturin av heimvístum málum er hækkaður í mun til undanfarna árið og er 9 % í 2013. Í 2012 var parturin av heimvístum málum 7% og í 2011 13%.

Parturin av málum, sum fullu burtur, áðrenn Kærunevndin hevði tikið støðu til kæruna, er 16% í 2013 og sostatt hægri enn undanfarna árið, tá 13% av málunum fullu burtur. Í 2011 var parturin av burturfalnum málum 20%.

Kærur, sum falla burtur, eru í høvuðsheitunum kærur, sum verða tiknar aftur, tí Almannaverkið í samband við kæruviðgerðina hevur endurskoðað málið og er komið til annað úrslit t.v.s. broytt ta upprunaligu avgerðina, sum varð kærd. Tað er positivt, at Almannaverkið leggur seg eftir sjálvt at endurskoða sínar avgerðir, tá tær eru kærdar, m.a. tí Almannaverkið á hendan hátt eisini skjótari tillagar avgerðir sínar í mun til nýggjar avgerðir frá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum, men best er sjálvandi, um tað er parturin av staðfestum avgerðum, sum er høgt, tí hetta merkir, at borgarin hevur fingið eina rætta avgerð beinanvegin.

Verða burturfalnu málini eisini roknaði við í positiva partin hjá Almannaverkinum, so verður hesin parturin 76% í 2013, sum er nakað væl lægri enn í 2012, tá hetta talið var 87%. Til samanberingar kann nevnast, at hetta talið í 2011 var 79%.

Málini, sum kunnu roknast í positiva partin hjá Almannaverkinum, eru soleiðis færri í 2013 enn undanfarnu árini.

Avgerðirnar, sum verða broyttar ella heimvístar, mynda tey mál, sum ikki eru nøktandi viðgjørd. Hetta er fyri alt økið tilsamans 24% av málunum í 2013. Til samanberingar kann sigast, at í 2012 og 2011 vóru ávikavist 13% og 21% av kærumálunum hjá Almannaverkinum broytt ella heimvíst.

## Prosentbýtið

Í uppgerðini viðvíkjandi Kærunevndini í almanna- og heilsumálum hava vit ikki bert víst á, hvussu nógvar avgerðir eru staðfestar, broyttar v.m., men hava eisini víst á, hvussu nógv hetta svarar til í prosentum av avgreiddum málum. Vit hava gjørt hetta, tí tað er lættari at samanbera frá einum ári til annað, tá broytingarnar eru gjørdar upp í prosentum. Tað er tó greitt, at broytingar í prosentbýtinum skulu takast við fyrivarni, serliga tá hugt verður eftir einstøku lógarøkjunum, tí talan er um so fá mál, at heilt fáar avgerðir kunnu hava avgerandi ávirkan á tølini.

# Forsorgarmál

| | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 31 | 65% | 47 | 73% | 21 | 57% |
| Broytt | 5 | 10% | 6 | 9% | 3 | 8% |
| Heimvíst | 7 | 15% | 3 | 5% | 5 | 13,5% |
| Burturfallin | 5 | 10% | 8 | 13% | 8 | 21,5% |
| Avvíst | 1 | | - | | 2 | |
| Kærufreist | 4 | | 2 | | 2 | |
| Uppafturtøka | 2 | | - | | 2 | |
| Steðgandi virknaður | 1 | | - | | - | |
| **Í alt** | **56** | | **66** | | **43** | |

Forsorgarlógin fevnir um eitt ógvuliga breitt øki, og hetta vísa avgreiddu málini eisini.

Tað er ikki nakað ávíst øki innan forsorgarlógina, har tað eru serliga nógv mál hetta árið, men snúgva málini seg um bæði endurbúgving, uppihaldshjálp, stakútreiðslur, hjálparráð og endurgjald fyri inntøkumiss. Tað er soleiðis ikki nakað, sum kann takast framum

## Prosentbýtið

Prosentparturin av forsorgarmálum, sum eru staðfest, er lægri í 2013 enn bæði undanfarnu árini, meðan parturin av málum, sum eru burturfallin er hægri enn bæði undanfarnu árini. Prosentparturin av avgerðum, sum eru broyttar, er lægri enn í 2012 og 2011, meðan parturin av heimvístum málum er hægri enn í 2012, men lægri enn 2011.



# Lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk

## Viðgerð eftir forsorgarlógini ella lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk

Lógin um arbeiðsfremjandi tiltøk fekk gildið 1. januar 2013 og fevnir m.a. um virknisvenjing, arbeiðsbúgving og tillagað størv. Hendan lóg skal koma í staðin fyri ásetingarnar í forsorgarlógini um endurbúgving, vard størv v.m. og skiftisreglurnar áseta, at í málum, har avgerð ikki er tikin, tá lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk kemur í gildi, verður avgerð tikin sambært reglunum í hesi lóg.

Ein avgerandi munur millum skipanina, sum hon var eftir forsorgarlógini og skipanina eftir lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk er, at eftir gomlu skipanini varðveiddi viðkomandi vanligu lønina, tá viðkomandi fór í vart starv. Eftir nýggju skipanini verður farið burtur frá meginregluni um at varðveita fulla løn, tá arbeiðsførleikin er skerdur.

Nevndin viðgjørdi tvær kærur, har kærararnir ynsktu at verða fevndir av forsorgarlógini, heldur enn eftir nýggju lógini. Í øðrum málinum staðfesti Kærunevndin í almanna- og heilsumálum, at umsóknin um vart starv varð viðgjørd eftir nýggju fyriskipanini um tillagað starv, og í hinum málinum broytti nevndin avgerðina og avgjørdi, at umsóknin skuldi viðgerast eftir forsorgarlógini



# Fyritíðar- og fólkapensjón (ískoyti, afturgjaldskrøv v.m.)

| | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 8 | 47% | 24 | 86% | 14 | 64% |
| Broytt | 2 | 12% | 1 | 3,5% | 6 | 27% |
| Heimvíst | 2 | 12% | 2 | 7,0% | - | |
| Burturfallin | 5 | 29% | 1 | 3,5% | 2 | 9% |
| Kærufreist | 1 | | - | | 2 | |
| **Í alt** | **18** | | **28** | | **24** | |

Nevnast kann, at heili 9 av kærumálunum í hesum bólkinum vóru um afturgjaldskrøv, sum Almannaverkið hevði sett fram í sambandi við eftirrokning av pensjónum. 5 av hesum avgerðum vórðu broyttar.

## Broyting í skattareglunum ávirkan á pensjónsútgjald

Fyritíðarpensjón og viðbót til fólkapensjón verður lækkað, um pensjónistur hevur inntøku afturat pensjónini omanfyri ávísa upphædd, jbr. § 19 í almannapensjónslógini

Inntøka frá leigu kann gerast upp eins og onnur B-inntøka, og verður skattskylduga inntøkan tá bruttoinntøkan frádrigin viðkomandi rakstrarútreiðslur, sí §§ 25 og 31 í skattalógini. Nettoinntøkan av húsaleigu verður tá løgd saman við inntøkuni annars til skattskyldugu inntøku pensjónistsins, og skattur verður roknaður av samlaðu upphæddini eftir vanliga skattastiganum.

Vísandi til serstaka skipan, kann leiguinntøka nú ístaðin verða gjørd upp soleiðis, at rakstrarútreiðslur verða ikki frádrignar, men verður skattur roknaður av leiguinntøku, sum fer upp um kr. 24.000 árliga, jbr. § 8a í ásetingarlógini. Av hesari nettoinntøku verður goldið 25% í skatti. Onnur skattskyldug inntøka sum t.d. lønarinntøka verður skattað eftir vanliga skattastiganum, og verður inntøka frá leigu ikki roknað upp í hesa inntøku, um hendan skipan verður vald. (Hesin standardfrádrátturin kann sigast at koma í staðin fyri tær útreiðslur, sum viðkomandi annars kundi drigið frá í einari vanligari uppgerð av inntøkuni.)

Í samband við eftirrokning av pensjón brúkti Almannaverkið bruttohúsaleiguinntøkuna á kr. 55.000, meðan kærarin, hvørs leiguinntøka var gjørd upp eftir § 8a í ásetingarlógini, metti, at tað var nettoinntøkan á kr. 31.000, sum skuldi brúkast.

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgjørdi, at tað er leiguinntøkan eftir frádrátti av kr. 24.000, sum skal skal takast við, tá avgerast skal, um pensjónistur hevur eina inntøku omanfyri frádráttarfríu inntøkuupphæddina, velur pensjónisturin at gera húsaleiguinntøkuna upp eftir § 8a í ásetingarlógini.

## Eftirrokning av pensjón

Sambært almannapensjónslógini § 21a, stk. 1 skal Almannaverkið við árslok eftirrokna allar tær pensjónir, sum eru umroknaðar í árinum, umframt hjá teimum, sum fyrstu ferð hava fingið pensjón tillutað í árinum.

Hendan reglan hevur við sær, at hesir pensjónistar fáa eitt á-konto útgjald frá Almannaverkinum gjøgnum árið, og síðani við árslok verður gjørt endaliga upp, hvat pensjónisturin veruliga hevði rætt til at fáa útgoldið. Munurin verður so antin útgoldin ella kravdur aftur frá pensjónistinum. Tað er í hesum føri uttan týdning, um pensjónisturin hevur verið góð- ella illvarin um rætt sín til útgoldnu pensjónina.

Soleiðis staðfesti Kærunevndin í almanna- og heilsumálum í tveimum førum avgerðir hjá Almannaverkinum at eftirrokna pensjónir og krevja aftur ov nógva útgoldna pensjón á uml. kr. 9.000.

Hinvegin broytti Kærunevndin tríggjar avgerðir hjá Almannaverkinum at eftirrokna pensjónir fyri 2012 og strikaði afturgjaldskrøv á kr. 12.000 og kr. 38.000. Avgerðin varð grundað við, at heimild er ikki at eftirrokna pensjón fyri 2012 eftir § 21a í almannapensjónslógini, tí hon ikki er umroknað og heldur ikki ásett fyrstu ferð. Heldur Almannaverkið, at pensjónin er móttikin av órøttum og móti betri vitandi, so má Almannaverkið seta fram nýtt afturgjaldskrav samsvarandi treytunum eftir §§ 22 og 23 í almannapensjónslógini.

Kærunevndin viðgjørdi í 2007 sama spurning og segði longu tá, at heimild er ikki at eftirrokna eftir § 21a í almannapensjónslógini, tá pensjónin ikki er umroknað ella ásett fyrstu ferð. Tí er óskiljandi, at Almannaverkið í 2013 eftirroknar pensjón, sum ikki er umroknað ella ásett fyrstu ferð.

# Fyritíðarpensjón (tillutan, hækkan v.m.)

| | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 24 | 58% | 16 | 64% | 16 | 67,0% |
| Broytt | 2 | 5% | 1 | 4% | 1 | 4,0% |
| Heimvíst | 6 | 15% | 3 | 12% | 3 | 12,5% |
| Burturfallin | 9 | 22% | 5 | 20% | 4 | 16,5% |
| Kærufreist | 1 | | 3 | | 1 | |
| Uppafturtøka | - | | - | | 1 | |
| **Í alt** | **42** | | **28** | | **26** | |

Hetta árið vóru 67% av avgerðunum staðfestar, og er tað ein øking í mun til tey bæði undanfarnu árini. Hinvegin er talið av burturfalnum málum lækkað í mun til tey bæði undanfarnu árini. Samanlagt er parturin av málum, sum antin eru staðfest ella burturfallin, tann sami sum í 2012, men hægri enn í 2011. Parturin av avgerðum, sum eru broyttar ella heimvístar, er júst tann sami sum í 2012, men lægri enn í 2011.




Í 10 av avgerðunum var talan um, at kærari hevði fingið noktað fyritíðarpensjón, í 6 av málunum varð kært um, at viðkomandi bert hevði fingið lægstu fyritíðarpensjón, og í 12 av málunum var støðan tann, at kærarin hevði fingið miðal fyritíðarpensjón, men metti seg hava rætt til hægstu.

## Karenstíð í sambandi við fyritíðarpensjón

Galdandi frá 1. januar 2013 var broyting gjørd í almannapensjónslógini, sum hevði við sær, at tillutan av fyritíðarpensjón varð flutt frá umsóknardegnum og fram til játtanardagin, tó soleiðis, at pensjón í seinasta lagi verður játtað frá 1. í fjórða mánaðinum eftir, at umsókn er móttikin.

Kærunevndin viðgjørdi nøkur mál, har kærararnir gjørdu galdandi, at viðgerðartíðin hevði verið alt ov drúgv, og at teir áttu at fingið pensjón frá 1. í mánaðanum eftir umsóknardagin.

Nevndin viðmerkti, at tað er góður fyrisitingarsiður, at mál verða viðgjørd innan rímiliga tíð. Men hvat er at meta sum rímilig viðgerðartíð, er tengt at slagi av máli og eisini ítøkiligu umstøðunum í málinum.

Fyritíðarpensjón er ein veiting, sum er treytað av heilsuligu støðuni hjá viðkomandi og er ikki ein veiting, sum er treytað av "objektivum konstaterbarum kriterium" sum t.d. aldri. Í slíkum málum er tí neyðugt at innheinta upplýsingar um heilsuligu viðurskiftini hjá umsøkjaranum, áðrenn støða kann verða tikin til umsóknina.

Viðgerðartíðirnar í viðgjørdu málunum lógu frá 3½ til 6½ mánaðir. Viðgerðartíðin kundi ikki alment sigast at vera óvanliga ella órímiliga long fyri mál av slíkum slagi og í ítøkiligu førinum varð málsviðgerðartíðin ikki mett at vera so long, at tað í sjálvum sær hevði við sær, at talan var um feil í viðgerðini.

Kærunevndin staðfesti tí avgerðirnar hjá Almannaverkinum at játta fyritíðarpensjón frá 1. í fjórða mánaðinum eftir umsóknardagin.

# Dagpeningur

| | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Staðfest | 8 | 61% | 9 | 64% | **5** | **71%** |
| Broytt | 1 | 8% | - | | **2** | **29%** |
| Heimvíst | - | | 1 | 7% | **-** | |
| Burturfallin | 4 | 31% | 4 | 29% | **-** | |
| Kærufreist | 2 | | 2 | | **-** | |
| **Í alt** | **15** | | **15** | | **7** | |

## Søkt ov seint

Meira enn helvtin av málunum snúðu seg um, at dagpeningur var noktaður heilt ella partvíst, tí viðkomandi søkti ov seint. Hesi mál eru afturvendandi, og grundgevingin fyri seinu umsóknini er ofta, at tey væntaðu, at onkur annar tók sær av at senda læknaváttan ella umsókn til Almannaverkið.

Ikki fyrr enn umsøkjarin verður varugur við, at ongin peningur er komin á kontuna, venda tey sær til Almannaverkið og finna tá út av, at ongin fráboðan er komin til Almannaverkið.

# Barnagjaldslógin

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 3 | 2 | 1 |
| Burturfallin | 2 | - | 1 |
| Uppafturtøka | 1 | - | 1 |
| **Í alt** | **6** | **2** | **3** |

Málini snúðu seg um forskotsvísa rindan av barnapeningi og innheinting av barnagjaldi.

# Stuðul til uppihaldspening

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | - | 3 | 2 |
| Burturfallin | 1 | - | - |
| Heimvíst | 1 | - | - |
| Kærufreist | 1 | 1 | - |
| **Í alt** | **3** | 4 | **2** |

Innihaldsliga snúðu hesi mál seg um umsóknir, sum vórðu noktaðar, tí tær vóru innkomnar, eftir at freistin at søkja um stuðul var farin, og um avmarkingina av stuðlinum, har stuðul verður veittur av goldnu upphæddina, sum fer upp um vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn. Rindar persónur bert vanliga árliga gjaldið fyri eitt barn, verður stuðul ikki latin.

# Kommunurnar

## Dagstovnalógin

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | - | 2 | **2** |
| Broytt | 1 | - | **-** |
| Heimvíst | 2 | - | **-** |
| Burturfallin | 1 | - | **-** |
| Avvíst | 1 | - | **-** |
| Kærufreist | - | 1 | **-** |
| **Í alt** | **5** | **3** | **2** |

### Ikki fíggjarligt frípláss hóast forsorgarveiting

Fíggjarligt frípláss, antin fult ella partvíst, kann veitast foreldrum, ið ikki sjálvi megna at rinda útreiðslurnar sambært dagstovnalógini, jbr. § 6a í ll. nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

Í 2011/2012 kann fult fíggjarligt frípláss játtast, um inntøkugrundarlagið er undir 235.500 kr. Fyri hvørjar 1.000 kr., inntøkugrundarlagið er hægri enn 227.300 kr., lækkar fríplássið við 2%. Er inntøkugrundarlagið hægri enn kr. 280.500, verður einki fíggjarligt frípláss latið.

Kærari hevði 4 børn og fekk forsorgarveiting, kr. 14.084 um mánaðin, umframt barnapengar á kr. 50.688 árliga, tilsamans kr. 219.696 árliga.

Men forsorgarveiting og barnapengar eru skattafríar inntøkur, og inntøka, sum er skattafrí, verður ikki tikin við, sum hon er men skal umroknast við einum upprokningarfaktori.

Tá inntøkan var umroknað, svaraði hon til kr. 392.774. Eftir frádrátt á kr. 50.688, sum er 4 ferðir vanliga barnagjaldið, bleiv inntøkugrundarlagið kr. 342.086. Tá hetta var hægri enn kr. 272.300, var ikki grundarlag fyri at játta fíggjarligt frípláss.

# Barnaverndarlógin

| | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Staðfest | 2 | 2 |
| Broytt | - | 1 |
| Heimvíst | - | 1 |
| Burturfallin | - | 2 |
| Avvíst | - | 3 |
| Uppafturtøka | - | 1 |
| Steðgandi virknaður | - | 1 |
| **Í alt** | **2** | **11** |

Heili 11 av málunum í 2013 vóru eftir barnaverndarlógini. Hetta er nógv í mun til talið av málum innan hetta økið seinastu árini. Innihaldsliga eru málini ógvuliga ymisk og snúgva seg m.a. um fyriskipanir í samband við umsorganar-yvirtøku og kunning til foreldur, sum ikki hevur foreldramyndugleika.

3 av kærdu málunum vóru um avgerðir hjá Fosturforeldraskipanini og snúðu seg um val av fosturforeldrum. 1 av hesum kærum varð afturkallað, áðrenn nevndin tók støðu, og 1 varð avvíst. Hetta seinna málið var eftir áheitan tikið upp til nýggja viðgerð, men niðurstøðan var tann sama.

Kært var um valið av fosturforeldrum í sambandi við umsorganaryvirtøku. Kærunevndin í almanna- og heilsu-málum metti, at ein viðgerð av avgerðini hjá Fosturforeldraskipanini samtíðis vil vera ein støðutakan til avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini, har treytirnar fyri fosturforeldrini eru ásettar. Tá talan í hesum føri er um meting, sum er so tætt tengd at avgerðini hjá Høvuðsbarnaverndar-nevndini er mett, at Kærunevndin í almanna- og heilsumálum ikki er rætti kærumyndugleiki, og tí varð kæran avvíst.

# Sjúkrahúsverkið

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 3 | 4 | 7 |
| Broytt | 1 | 2 | 1 |
| Heimvíst | 4 | - | 1 |
| Burturfallin | 10 | 3 | 4 |
| Kærufreist | - | - | 1 |
| **Í alt** | **18** | **9** | **14** |

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgreiddi 14 mál eftir sjúkrahúslógini í 2013. Av hesum vóru 13 kærumál um ávísing av fylgjara og endurgjald av ferðaútreiðslum í samband við fylgjarar. 1 mál snúði seg um endurvenjing í Danmark.

7 av málunum vórðu staðfest, 1 varð broytt, 1 heimvíst og 4 fullu burtur, tí sjúkrahúsverkið avgjørdi at taka málini upp til nýggja viðgerð, eftir at málið var kært. Í 1 føri var støða tikin til frávik frá kærufreist.



# Heilsutrygd

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | - | - | 3 |
| Heimvíst | 1 | - | - |
| Burturfallin | - | 1 | 1 |
| Kærufreist | - | - | 1 |
| **Í alt** | **1** | **1** | **5** |

Í 2013 vóru 5 av málunum, sum Kærunevndin í almanna- og heilsumálum avgreiddi, eftir lóg um almenna heilsutrygd. 3 mál vóru staðfest, 1 fall burtur og í 1 føri var støða tikin til frávik frá kærufreist.

4 av avgerðunum snúðu seg um ískoyti til fótarøkt. Sambært kunngerð nr. 86 frá 13. juni 2013 um ískoyti til gjald fyri veiting hjá statsautoriseraðum fótterapeuti ber einans til at fáa ískoyti til fótarøkt, um viðkomandi hevur diagnosu, nevnd í hesi kunngerð. Kærari, sum vegna nógv niðursetta sjón ikki kundi røkta føturnar, hevði tí ikki rætt til ískoyti.

## Viðgerðartíðin

Í 2013 var miðal viðgerðartíðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum 4 mánaðir. Hetta er sama miðal viðgerðartíð sum í 2012 og ein mánaða styttri enn í 2011, tá miðal viðgerðartíðin lá um 5 mánaðar.

Kærustovnurin arbeiðir altíð við at hava so stutta viðgerðartíð sum gjørligt, men roknast kann ikki við, at tað ber til at stytta miðal viðgerðartíðina niður um 4 mánaðir fyri hetta slag av málum, tí atlit skal takast til ummæli og hoyring.

# 5. Skatta- og avgjaldskærunevndin

## Nevndin

Í Skatta- og avgjaldskærunevndini sita:

- Turið D. Hentze - advokatur og forkvinna
- Rannvá Sólheim - løgfrøðingur
- Kaj Johannesen - cand. merc.
- Pauli Klakkstein - maskinmeistari
- Niclas Joensen - civiløkonomur HD

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá TAKS um skatt, toll og meirvirðisgjald
- Avgerðir hjá Akstovuni um avgjald við skrásetingargjald á motorakførum

## Móttikin mál

Í 2013 eru 37 kærur latnar Skatta- og avgjaldskærunevndini. Av hesum eru 15 kærur innan skattaøkið, 7 kærur eru innan mvg-økið og 15 kærur viðvíkja øðrum økjum, herundir t.d. tolli, rentustuðli, toll- og skattafyrisiting o.s.fr.

**37**

## Nýggj mál




Eitt sindur færri kærur eru innkomnar í 2013 enn í 2012, og býtið er eisini øðrvísi. Tað serliga hetta árið er, at lutfalsliga nógvar kærur eru innan tolløkið.

## Avgreidd mál

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði 8 vanligar fundir í 2013. Tilsamans vóru 31 mál avgreidd í 2013, meðan talið av avgreiddum málum í 2012 og 2011 var ávikavist 72 og 62.

Talið av avgreiddum málum í 2013 er sostatt væl lægri enn undanfarnu ár.

**31**

**Avgreidd mál**

Orsøkin til hetta er, at ikki so nógv mál eru innkomin.

## Býtið av avgreiddum málum

Í 2012 vóru skattakærurnar aftur fleiri bæði í tali og lutfalli í mun til árini frammanundan, har mvg-kærurnar vóru flestar. Í 2013 vóru mvg-kærurnar tó aftur flestar.

Lutfalsliga nógv mál eru um uppafturtøku, tey flestu um uppafturtøku eftir teimum serligu reglunum í toll- og skattafyrisitingarlógini.

Málini um toll eru eisini fleiri í tali enn undanfarnu árini, og hesi snúgva seg øll um innflytan av e-sigarettum. Serligt fyri 2013 er, at onki mál er um at áleggja sekt eftir skattalógini.

Hóast TAKS hevur gjørt átøk innan ávís øki, sæst hetta ikki aftur í tølum ella býtinum av kærum.

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Skattur | 13 | 30 | 4 |
| Stuðulslógirnar | 13 | 18 | 1 |
| Sekt eftir § 104 í skattalógini | 0 | 0 | 0 |
| Meirvirðisgjald | 15 | 9 | 9 |
| Lønhæddaravgjald | 0 | 0 | 0 |
| Skrásetingargjald á motorakførum | 0 | 1 | 1 |
| Tollur og onnur avgjøld | 0 | 0 | 4 |
| Kærufreist | 3 | 6 | 0 |
| Mótrokning | 9 | 2 | 2 |
| Uppafturtøka | 2 | 2 | 7 |
| Annað | 7 | 4 | 3 |
| **Í alt** | **62** | **72** | **31** |

## Avgreiðslan

Av 31 kærumálum eru 11 kærumál staðfest av nevndini. Flestu kærumál eru sostatt staðfest, og í hesum er eingin broyting í mun til undanfarin ár.

Sum undanfarnu ár eru 6 mál heimvíst til viðgerð, og hetta er lutfalsliga nógv fyri 2013, tí so fá mál eru viðgjørd í mun til undanfarnu ár.




# Taks

Av teimum 31 kærunum, sum eru avgreiddar í 2013, eru 24 kærur um avgerðir hjá TAKS. Ein umbøn um tilmæli viðvíkjandi avgjaldsfríari innflytan er viðgjørd hetta árið.

Serliga áhugavert er, at onki mál er broytt í 2013. Parturin av heimvístum málum er tó lutfalsliga stórur hetta árið. 3 av teimum 6 heimvístu málunum eru um sýtan at innflyta e-sigarettir.

Viðvíkjandi málum av serliga stórum týdningi kann upplýsast, at málini í 2013 hava verið fjølbroytt, og at har hava ikki verið serliga nógv mál um sama trupulleika.



## Býtið av avgreiddum málum

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 20 | 17 | 8 |
| Broytt | 1 | 6 | - |
| Partvís broytt | - | 3 | - |
| Heimvíst | 6 | 4 | 5 |
| Burturfallin | 3 | 9 | 2 |
| Avvíst | 20 | 9 | 4 |
| Annulerað | 1 | - | - |
| Kærufreist | 3 | 3 | 0 |
| Annað | 1 | 5 | 6 |
| **Í alt** | **55** | **56** | **25** |

## E-sigarettir

Fleiri kærumál hava tó verið um, at TAKS hevur sýtt fólki at innflyta E-sigarettir við tí grundgeving, at talan er um heiligvág. Hesi eru mestsum øll vorðin heimvíst, tí grundgevingin ikki hevur verið nøktandi.

## Onnur verulig heilsurøkt

Á mvg-økinum hava verið einstakar avgerðir um frítøku fyri mvg fyri aðra veruliga heilsurøkt, sum er eitt serligt hugtak innan mvg-økið. Um ein viðgerð skal vera fevnd av hesum, eru krøv til bæði sjálva viðgerðina og førleikarnar til sjálvan viðgeran. Í einum máli hevur nevndin tikið avgerð um, at kærarin ikki leyk treytirnar til útbúgving, m.a. tí kærarin ikki hevði eina útbúgvingargongd/skúlagongd innan sjúkulæru/farmakologi. Nevndin viðmerkti, at tað í hesum sambandi ikki er nóg mikið at fáa til vega eina váttan frá einum lækna um, at viðkomandi hevur undirvíst kæraranum tað kravda tímatalið.

# Kommunalu Skattakærunevndirnar

5 kærur vóru um avgerðir hjá Kommunalu Skattakærunevndunum í 2013, og talið av kærum er sostatt aftur á sínum vanliga støði í mun til í 2012, tá talið av kærum innan hetta økið var serliga høgt.

Meira enn helvtin av málunum eru ávikavist broytt, partvís broytt ella heimvíst, og hetta verður mett at vera nógv.

Stýrið hjá TAKS hevur kært 3 av 5 kærdu avgerðunum hjá Kommunalu Skattakærunevndunum, og tað eru eisini hesar avgerðir, sum eru ávikavist broyttar, partvís broyttar ella heimvístar av Skatta- og avgjaldskærunevndini.




## Býtið av avgreiddum málum

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Staðfest | 4 | 5 | **2** |
| Broytt | 2 | 4 | **1** |
| Partvís broytt | - | - | **1** |
| Heimvíst | - | 2 | **1** |
| Burturfallin | - | 1 | **-** |
| Kærufreist | - | 3 | **-** |
| **Í alt** | **6** | **15** | **5** |

## Arbeiðsloysisstuðul frá NAV

Á skattaøkinum hevur nevndin tikið avgerð um, at arbeiðsloysisstuðul frá NAV í Norra er fevndur av § 18, stk. 1 í Norðurlendska tvískattasáttmálanum, tí arbeiðsloysisstuðulin er útgoldin sambært almennu lóggávuni í Norra. Hetta merkir, at arbeiðsloysisstuðulin verður skattaður í Føroyum, tó soleiðis at hædd verður tikin fyri tí skatti, sum er goldin til Norra, jb. grein 25 í Norðurlendska tvískattasáttmálanum.

## Uppafturtøka av álíkning

Fleiri mál hava eisini verið um uppafturtøku eftir reglunum í Toll- og skattafyrisitingarlógini.

Í einum máli hevur nevndin tikið avgerð um, at skattgjaldarin sjálvur ikki kann biðja um uppafturtøku eftir § 25b, stk. 1, nr. 4 í toll- og skattafyrisitingarlógini, sum loyvir uppafturtøku longur aftur enn 3 ár, um skattgjaldarin ella onkur hansara vegna við vilja ella av stórum ósketni hevur verið atvold til, at skattamyndugleikarnir hava gjørt eina skattaálíkning á einum skeivum ella ófullfíggjaðum grundarlagi.

# Akstovan

1 kæra var um eina avgerð hjá Akstovuni í 2013. Hetta er sama tal sum í 2012 og 2011.

Árini frammanundan hava 4-6 kærur árliga verið um avgerðir hjá Akstovuni um árið, men hesi seinastu 3 árini hevur bert verið ein kæra um árið.




## Gjaldoyrakursur tann dagin bilur verður skrásettur

Viðvíkjandi skrásetingargjaldi á bilum hevur nevndin staðfest siðvenju hjá Akstovuni um at brúka gjaldoyrakursin tann dagin, bilurin verður skrásettur, tá CIF-virðið á bilinum skal roknast um frá útlendskum gjaldoyra.

Spurningurin var annars, um tann dagurin, bilurin stendur í føroyskari havn, er avgerandi, tí hetta er tann dagurin, sum er avgerandi í mun til at staðfesta avgjaldsskylduga virðið á bilinum.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2013 var gott 5 mánaðir, eins og í 2012.

Viðgerðartíðin verður mett at vera á einum nøktandi støði fyri hetta slagið av málum.

# 6. Kærunevndin hjá Studna

## Nevndin

Í Kærunevndini hjá Studna sita:

- Anna Borg Dahl - løgfrøðingur og forkvinna
- Heðin D. Poulsen - løgfrøðingur
- Bjørg Róin - lestrarvegleiðari

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin hjá Studna viðger kærur um avgerðir hjá Studna eftir løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul.

## Móttikin mál

Í 2013 komu 9 nýggjar kærur til Kærunevndina hjá Studna. Hetta eru nógv færri enn ári frammanundan, tá 21 kærur komu inn, men á leið sama tal av kærum sum í 2011, tá 10 kærur vóru móttiknar.




**9**

## Nýggj mál

2 av kærunum vóru um lestrarstuðul í Føroyum, 2 vóru um ferðastuðul til lesandi uttanlands, 4 vóru um lestrarstuðul uttanfyri Føroyar og 1 um útbúgvingarstuðul uttanfyri Norðurlond.

Vart skal gerast við, at ein broyting er gjørd í uppgerðarháttinum í mun til undanfarnu ár.

ÚSUN er stytting fyri útbúgvingarstuðul uttanfyri Norðurlond, og upprunaliga fevndi hesin bert um lestrarstuðul uttanfyri Norðurlond, men við lestrarstuðulslógini frá 2007 gjørdist møguligt í serstøkum førum at veita stuðul til skúlagjald og livikostnað í Norðurlondum.

Tær flestu av avgerðunum, sum nevndin hevur viðgjørt innan bólkin ÚSUN, hava verið um útbúgvingarstuðul uttanfyri Norðurlond.

Men fleiri og fleiri av málunum snúgva seg um lestrarstuðul í Norðurlondum. Soleiðis eru í 2013 3 mál um útbúgvingarstuðul í Norðurlondum, og onki um útbúgvingarstuðul uttanfyri Norðurlond. Sum víst á í ársfrágreiðingini fyri 2010 snúðu 5 av teimum 9 málunum innan henda bólk seg um stuðul í Norðurlondum, og í 2009 var tað 1 av 4 málum.

Ístaðin fyri at hava bólkin ÚSUN, sum bæði fevnir um stuðul til skúlagjald og livikostnað í Norðurlondum og uttanfyri Norðurlond, er hesin bólkur býttur upp soleiðis, at tað sæst, hvussu nógvar kærur eru ávikavist um útbúgvingarstuðul í Norðurlondum í mun til kærurnar uttanfyri Norðurlond.

Tað verður framvegis mett at vera skilagott at hava bólkin ferðastuðul til lesandi uttanlands sum ein bólk fyri seg. Hesin kundi í prinsippinum eisini verið býttur upp í, um talan er um stuðul í ella uttanfyri Norðurlond. Men tað verður ikki mett at vera áhugavert at gera hetta, tí ferðastuðulin fevnir um øll lesandi uttanlands og ikki bara tey, sum fáa stuðul til skúlagjald og livikostnað.

## Avgreidd mál

Kærunevndin hevði 4 fundir í 2013 og avgreiddi 8 mál. Avgreidda tali er nógv lægri enn undanfarna ár og er orsøkin til hetta, at færri kærur eru innkomnar.

2 av avgreiddu málunum hetta árið snúðu seg um lestrarstuðul í Føroyum, 2 av málunum vóru um ferðastuðul uttanlands, og 4 snúðu seg um lestrarstuðul uttanfyri Føroyar.

Onki mál var um lestrarstuðul uttanfyri Norðurlond.

**8**

**Avgreidd mál**

## Avgreiðslan

Av teimum 8 málunum, sum vóru avgreidd hetta árið, vóru 7 staðfest og 1 fall burtur.




## Søkt ov seint

Í báðum avgerðunum um ferðastuðul uttanlands var grundgevingin hjá Studna, at tey lesandi høvdu søkt ov seint. Hesar kærur, har tey lesandi fáa noktað stuðul, tí tey eru ov sein at søkja, vísa seg at vera afturvendandi. Avgerðirnar verða tó í flestu førum staðfestar, tí heimild er ikki at gera frávik frá umsóknarfreistini.

Ov sein umsókn var eisini grundgevingin hjá Studna at nokta stuðul til livikostnað og skúlagjald í Norðurlandi fyri fyrstu lestrarhálvu. Kærunevndin staðfesti avgerðina hjá Studna at játta stuðul frá næstu lestrarhálvu.

## Stuðul til skúlagjald og livikostnað

Studni noktaði stuðul til skúlagjald til útbúgving innan tónleik í Norðurlandi vísandi til, at talan var ikki um eitt serstakt føri, tí tað bar til at taka slíka útbúgving í Norðurlondum uttan at rinda skúlagjald. Nevndin staðfesti avgerðina.

Í einum máli játtaði Studni stuðul til livikostnað, men noktaði í fyrsta umfari stuðul til skúlagjald. Eftir at kært var, tók Studni málið upp til nýggja viðgerð og játtaði stuðul til skúlagjald. Kæran fall tískil burtur.

Ein treyt fyri at fáa stuðul til livikostnað uttanlands er, at tann lesandi skal vera á lærustovninum og skal kunna fylgja lestrinum. Talan kann ikki vera um fjarlestur. Tá tann lesandi ikki búði í lestrarlandinum, men í einum øðrum landi, var avgerðin hjá Studna at nokta stuðul staðfest.

## Lestrarstuðul í Føroyum

Onnur avgerðin um lestrarstuðul í Føroyum snúði seg um avgerð hjá Studna at nokta barnastudning, tí treytin um, at tann lesandi skuldi búgva saman við barninum, var ikki lokin, tá barnið hjá tí lesandi flutti uttanlands á eftirskúla.

Hin avgerðin snúði seg um, at verkætlanarstuðul varð noktaður, tí viðkomandi hevði fingið stuðul 2 ferðir, og hetta var tað, sum í mesta lagi kundi játtast.

Í 2013 varð miðal viðgerðartíðin fyri Kærunevndina hjá Studna 2½ mánaðir. Hetta er ein ½ mánaða longri enn miðal viðgerðartíðin í 2012, sum var 2 mánaðar.

Hóast eitt sindur longri enn í fjør, verður

## Viðgerðartíðin

viðgerðartíðin mett at vera góð, tí atlit skal takast til, at ummælistíð og hoyring eisini eru partur av viðgerðartíðini.

# 7. Kærunevndin í lendismálum

## Nevndin

Í Kærunevndini í lendismálum sita:

- Johnhard Klettheyggj - løgfrøðingur og formaður
- Fríður P. Dalsgarð - verkfrøðingur
- Birita Wardum - arkitektur

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin viðger kærur um:

- Avgerðir hjá kommununum eftir býarskipanarlógini ella byggisamtykt
- Avgerðir hjá kommununum eftir 1881-lógini um ognartøku
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um matrikulering og sundurbýti
- Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni eftir lóg um tinglýsing
- Avgerðir eftir lógini um eigaraíbúðir
- Avgerðir eftir lógini um bygging

**13**

**Nýggj mál**

## Móttikin mál

Í 2013 komu 13 kærur til Kærunevndina í lendismálum. Hetta er helvtina so nógvar kærur sum bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 26 og 25 kærur vóru móttiknar.

Kærutalið er soleiðis ógvuliga lágt hetta árið, eisini í mun til miðaltalið av kærum, sum hevur ligið á umleið 29 kærur um árið, síðan Kærustovnurin í 2007 byrjaði at virka sum skrivstova fyri Kærunevndina í lendismálum.

Eins og undanfarin ár eru flestu kærurnar hetta árið um bygging. Heili 10 av kærunum vóru um bygging, og 3 av kærunum vóru um matrikulering og sundurbýti. Ongar kærur vóru um tinglýsing og ognartøku í 2013.



## Avgreidd mál

Kærunevndin í lendismálum hevði hetta árið 11 fundir og avgreiddi 21 mál. Hetta eru nøkur færri enn bæði undanfarnu árini, tá nevndin avgreiddi ávikavist 29 og 24 mál.

Ein lítil broyting er í býtinum millum tey ymisku evnini við tað, at eingi mál um ognartøku og tinglýsing eru hetta árið.

Byggimálini (15 stk.) eru eins nógv í 2013 sum í 2012. Tað sama ger seg galdandi við málum um matrikulering/sundurbýti (6 stk.).

**21**

**Avgreidd mál**

Tó skal viðmerkjast, at eitt av málunum um sundurbýti var eftir lógini um eigaraíbúðir.

## Avgreiðslan

Um hugt verður eftir øllum avgreiddu málunum, so eru færri staðfestingar í 2013 enn bæði undanfarnu árini.

Parturin av avgerðum, sum eru heimvístar, er nakað minni, meðan fleiri avgerðir eru broyttar í 2013. Eingin mál eru burturfallin í 2013, men nakrar kærur eru afturkallaðar.



## Kærur um byggimál – 15 íalt:




Hesi mál fevna um byggimálsviðgerð av ymiskum slagi, og kann talan vera um kærur frá byggiharra, tí hann ikki fær tað byggiloyvið, sum hann metir seg hava rætt til, men eisini um kærur frá granna, sum metir, at bygt er t.d. ov høgt ella ov nær. Tað serliga við hesum øki er, at tað ikki einans eru lógir og kunngerðir, sum nevndin skal fyrihalda seg til, men eisini byggisamtyktir, sum eru ymiskar frá øki til øki.

## Uppfylling og bygging á havnalagi

Kært varð um, at kommuna hevði játtað byggiloyvi til víðkan av frystigoymslu, uppfylling av keihyli og 100 m av nýggjari bryggju sum frávik frá byggisamtykt. Kæran fekk steðgandi virknað. Samlaða viðgerðartíðin frá tí kæran kom inn til avgerð varð tikin var 3½ mánaðir.

Kærunevndin í lendismálinum broytti avgerðina hjá kommununi soleiðis, at byggiloyvið ikki hevði gildið.

Nevndin viðmerkti, at loyvið kundi ikki rúmast í hugtakinum frávik og vísti á, at sambært § 5, stk. 3 í Býarskipanarlógini skulu uppfylt ella turrløgd sjóøki, tunlar og onnur bygningsverk undir jørð hava heimild í góðkendari byggisamtykt, áðrenn hesi verða gjørd.

Sambært viðmerkingunum til broytingarnar í býarskipanarlógini, § 5, stk. 3 frá 2009, var hendan broytingin í býarskipanarlógini júst gjørd fyri at tryggja, at heimildin til uppfyllingina varð fingin til vega, áðrenn eitt møguligt loyvi varð givið. Lóggevarin ynskti við lógarbroytingini at koma burtur frá tí mannagongd, sum var áðrenn lógarbroytingina, har Innlendismálaráðið hevði valt at góðkenna broytingar eitt nú viðvíkjandi uppfyllingum við tí atliti, at broytingin longu var framd í verki, áðrenn nakað broytingaruppskot hesum viðvíkjandi varð sent inn til góðkenningar í Innlendismálaráðnum.

Vanligu freistirnar fyri broyting av byggisamtykt er 3 vikur til framløgu og 6 vikur til mótmæli.

Tvær vikur eftir avgerðina hjá nevndini samtykti Løgtingið at broyta býarskipanarlógina soleiðis, at landsstýrismaðurin í heilt serligum førum, eftir áheitan frá kommunustýrinum, kann taka avgerð um at víkja frá ásettu freistunum í býarskipanarlógini soleiðis, at framløgutíðin verður 1 viku og mótmælisfreistin 1 viku, um týðandi samfelagslig og vinnulig atlit tala fyri hesum. Frávik varð givið áðurnevndu kommunu at broyta byggisamtyktina við hesum styttu freistum.

## Bygging fram við landsvegi

Við tí endamáli at kunna koma tørvinum hjá eini vaksandi ferðslu á møti og at kunna gera umstøðurnar hjá teim ferðandi so góðar sum gjørligt, er landsstýrinum heimilað at áseta, hvussu langt frá landsvegi bygt skal verða. Áðrenn kommunalur byggimyndugleiki gevur loyvi til bygging framvið landsvegi, skal málið leggjast fyri vegamyndugleikar landsins, og skulu tey krøv, hesir seta til byggingina, verða knýtt sum treytir at byggiloyvinum. Sí ásetingar í §§ 6 og 7 í lóg um landsvegir.

Kærunevndin í lendismálum viðgjørdi eitt mál, har kommuna hevði sýtt byggiloyvi til umvæling/útbygging av sethúsum. Kærunevndin heimvísti málið til nýggja viðgerð hjá kommununi og grundaði hesa avgerð við, at tað ikki á nøktandi hátt er komið fram, hví granni fekk byggiloyvi til nýbygging av bilhúsi, har upplýst var, at Landsverk hevði givið loyvi til at bygt varð einans 5 metrar frá landsvegnum, meðan kærarin, sum býr í sama grannalagi, framvið sama landsvegastrekki, ikki fær byggiloyvi, tí byggilinjan uttan fyri hansara matrikulnummar er sett til 20 metrar. Í nýggju viðgerðini eigur kommunan at senda málið aftur til Landsverk til hoyringar og at heita á Landsverk um at gera eina ítøkiliga meting av tørvinum hjá eini vaksandi ferðslu á hesum landsvegastrekkinum. Her verður eisini víst til upplýsingar í málinum um, at ferðslan til bygdina er minkandi og møguligu ætlanina hjá Landsverk at flyta ella umskipa landsvegin til annað stað.

Nevndin viðmerkti annars, at tað hevði verið ynskiligt, at Landsverk gjørdi eina almenna kunning um, ella ásetti í kunngerð, hvar og hvussu nær bygt kann verða framvið landsvegi í Føroyum soleiðis, at borgarar kunnu verða kunnaðir um, hvar loyvt er at byggja framvið landsvegi, og hvør frástøðan skal verða til landsveg á teimum ymisku økjunum. Tí sum er verða borgarir, sum eiga fasta ogn framvið landsvegi, settir í eina sera óhepna støðu, tí teirra rættarstøða viðvíkjandi møguligari bygging framvið landsvegi er ikki alment kend.

## Kærur um matrikulmál – 6 íalt:

Hesi mál fevna um matrikulering og sundurbýti.

Eitt mál var eftir lógini um eigaraíbúðir í 2013. Hini málini vóru eftir lógini um matrikulering og sundurbýti.




## Sundurbýti í eigaraíbúðir

Kært var um, at Umhvørvisstovan hevði sýtt frábýti av húsum í tvær eigaraíbúðir. Kærunevndin í lendismálum broytti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni og grundaði avgerðina við, at húsini eru bygd uml. 1973, tvs. eftir at lógin um eigaraíbúðir kom í gildi, og vóru frá byrjan av býtt sundur í tvær sjálvstøðugar íbúðir við hvør sínum el-málara og betongdekki millum íbúðirnar. Tí kann hugsast, at ætlanin upprunaliga hevur verið, at møguleiki skuldi vera fyri einum sundurbýti eftir eigaraíbúðar-lógini seinni. Við hesum í huga, og tá Umhvørvisstovan ikki hevur kunnað prógvað tað øvugta, var ikki grundarlag fyri at nokta hesum sundurbýti.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2013 var 7 mánaðir og 5 dagar. Miðal viðgerðartíðin í 2012 var 6 mánaðir og 14 dagar. Miðal viðgerðartíðin var 6 mánaðir og 1 dagur í 2011. Viðgerðartíðin er sostatt longd við 21 døgum í 2013 í mun til 2012 og við 13 døgum í mun til 2011.

Viðmerkt verður at eitt einkult mál tók 17 mánaðir og 1 dag at viðgera. Orsøkin til hetta var, at málið bleiv útsett nakrar ferðir, tí kærarin vildi møta fyri kærunevndini, men av serstakari orsøk kundi hetta ikki lata seg gera fyrr enn á fundinum í januar 2013. Um hetta mál ikki verður talt við, so er miðal viðgerðar-tíðin fyri 2013, 6 mánaðir og 20 dagar.

Strembað verður altíð eftir at stytta um viðgerðartíðina, men roknað verður ikki við, at miðal viðgerðartíðin fyri hesa nevnd kemur niður um 6 mánaðir. Ein orsøk er, at tað ofta eru fleiri partar í hesum málum, sum allir skulu hava høvi at gera seg kunnugan við innkomnu upplýsingarnar og koma við við-merkingum. Tí tekur tað ofta langa tíð at fáa hesi mál lýst.

# 8. Vinnukærunevndin

## Nevndin

Vinnukærunevndin verður samansett av trimum ella fimm limum, tá hon skal taka støðu til einstøk kærumál; formanninum ella næstformanninum og tveimum ella fýra limum við serkunnleika á viðkomandi øki.

- Gurið Joensen - løgfrøðingur er formaður
- Eyðbjørn Larsen - løgfrøðingur er næstformaður

## Viðgerðarøkið

Vinnukærunevndin viðger kærur um:

- avgerðir hjá Akstovuni eftir lóg um ferðslu
- avgerðir hjá Arbeiðseftirlitinum eftir lóg um arbeiðsumhvørvi
- avgerðir hjá Jarðfeingi eftir lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum eftir lóg um fjarskifti
- avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eftir lóg um matvørur v.m., lóg um aling av fiski, lóg um djórasjúkur, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø
- avgerðir hjá Kappingarráðnum eftir lóg um kapping
- avgerðir hjá Landsverk eftir lóg um landsvegir og lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál
- avgerðir hjá Posteftirlitinum eftir lóg um postvirksemi
- avgerðir hjá Skráseting Føroya eftir partafelagslógini, smápartafelagslógini, ársroknskaparlógini, lóg um ávís vinnurekandi virkir, lóg um vinnurekandi grunnar, lóg um vinnu og lóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir
- avgerðir hjá Tryggingareftirlitinum eftir lóg um tryggingarvirksemi
- avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal
- Harumframt viðger Vinnukærunevndin kærur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

## Móttikin mál

Í 2013 eru 17 kærur latnar Vinnu-kærunevndini. Hetta eru nakrar færri enn bæði undanfarnu árini, tá ávikavist 20 og 21 kærur vórðu móttiknar.

Flestu móttiknu kærurnar hetta árið eru um avgerðir hjá Akstovuni. Hesar eru 6 í tali. Harnæst koma kærur um avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Landsverk, sum í báðum førum eru 4 í tali. 3 kærur komu inn um avgerðir hjá Jarðfeingi.

**17**

**Nýggj mál**

## Avgreidd mál

Tiknar vórðu 25 avgerðir í 2013. Hetta eru 4 færri enn í 2012 og 1 færri enn í 2011.

**25**

**Avgreidd mál**

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Skráseting Føroya | - | - | - |
| Landsverk | 2 | 6 | 6 |
| Arbeiðseftirlitið | 3 | - | - |
| Akstovan | 8 | 6 | 6 |
| Heilsufrøðiliga Starvsstovan | 8 | 12 | 7 |
| Posteftirlitið | - | - | - |
| Fjarskiftiseftirlitið | 1 | 1 | - |
| Kappingarráðið | - | - | - |
| Tryggingareftirlitið | 1 | 2 | 1 |
| Jarðfeingi | 3 | 1 | 5 |
| Setanarprógv | | 1 | - |
| **Í alt** | **26** | **29** | **25** |

# Avgreiðslan

Vinnukærunevndin staðfesti 8 av avgerðunum og heimvísti 2. 5 vórðu avvístar, 3 fullu burtur og 2 vórðu afturkallaðar.

Harumframt tók nevndin støðu til, um kæra skuldi hava steðgandi virknað í 3 førum. Harafturat vóru 2 avgerðir, sum viðgjørdu spurningin um uppafturtøku av avgerð hjá kærunevndini.



# Akstovan

## Serkøn

- Jón Kragesteen - lærari og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Gudrun Mortansdóttir Nolsøe - serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Palli Mortensen - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini
- Sølvi Reinert Hansen - serkønur limur viðvíkjandi ferðslulógini

## 6 avgreidd mál




## Steðgandi virknaður noktaður í samband við kæru um inndragan av koyrirætti

Kært var m.a. um, at Akstovan hevði inndrigið koyrirættin til bólkarnar C (lastbil) og D (buss). Avgerðin varð grundað á, at kærarin ikki leyk krøvini til sjónina, sum eru ásett í fylgiskjali til koyrikortkunngerðina. Í samband við kæruna bað kærarin um steðgandi virknað.

Vinnukærunevndin viðmerkti, at tað avgerandi atlitið, sum talar ímóti at loyva steðgandi virknaði, er atlitið til ferðslutrygdina. Hetta atlitið skal haldast uppímóti atlitinum til arbeiðs- og fíggjarstøðu kærarans, um avgerðin ikki fær steðgandi virknað. Vinnukærunevndin metti, at atlitið til ferðslutrygdina vigar sum útgangsstøði tyngri í mun til arbeiðs- og fíggjarstøðuna hjá einum persóni, og tað var ikki í hesum føri víst á umstøður, sum góvu grundarlag fyri at víkja frá hesum. Vísandi til hetta var avgjørt ikki at loyva steðgandi virknað.

### Umsókn um manuella ástøðisroynd sýtt

Kært er um, at Akstovan ikki vildi ganga umbøn kærarans á møti um eina sonevnda "manuella" roynd í ástøði til vinnuligan fólkaflutning til buss og harvið víkja frá vanligu mannagongdini um skrivliga ástøðisroynd á teldu.

Ásett er, at talan skal vera um serligar umstøður, áðrenn grundarlag er fyri at broyta mannagongdina í samband við ástøðisroyndina. Í hesum máli er ikki víst á serligar umstøður. Sum málið er upplýst er støðan tann, at kærarin ikki hevur klárað royndina, og tá hetta ikki er grundað í serligum umstøðum, gevur hetta ikki í sjálvum sær grundarlag fyri at eini sokallaðari manuellari ástøðisroynd. Avgerðin hjá Akstovuni er tí staðfest.

# Heilsufrøðiliga Starvsstovan

## Serkøn

- Bergur Hanusson - djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Jústines Olsen - djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Jákup Mørkøre - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini
- Guðrið Andorsdóttir - cand. scient. og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini
- Niels Therkildsen - djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi alilógini, matvørulógini, djórasjúkulógini, lóg um djóralæknavirksemi og lóg um hald og innflutning av vandamiklum djórum
- Ole Jürgens - djóralækni og serkønur limur viðvíkjandi matvørulógini, djórasjúkulógini og lóg um djóralæknavirksemi
- Ari Johannesen - cand. merc. og serkønur limur viðvíkjandi alilógini
- Ingolf Joensen - serkønur limur viðvíkjandi alilógini




## 7 avgreidd mál

## Løggilding kravd í samband við sølu av neyta- og seyðakjøti

Kært er um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sett forboð at selja neyta- og seyðakjøt beinleiðis til endabrúkaran frá øðrum sølustaði enn egnum garði. Vinnukærunevndin viðmerkti, at tá sølan av kjøti kring landið ikki kann metast at vera durasøla sambært § 12 í kunngerðini um løggilding og skráseting av matvøru-virkjum, er hendan fevnd av kravinum um løggilding í § 5, stk. 1 í somu kunngerð. Vísandi til hetta avgjørdi Vinnukærunevndin at staðfesta avgerðina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

## Broyting av aliøki

Í tveimum førum staðfesti Vinnukærunevndin avgerðir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni um broyting av aliøki. Kært varð, tí kærarin metti, at broytingin av aliøkinum fekk neiligar avleiðingar fyri hummara-virksemið í økinum.

Vinnukærunevndin viðmerkti, at sum lóggávan er í løtuni, er eingin forðing fyri, at myndugleikarnir geva hummaraloyvi og aliloyvi á somu firðum, og tá hummaraloyvi ikki hava neyva staðseting á firðinum, meðan aliloyvini hava fasta staðseting, kunnu eyðsæð íkoma støður, har áhugamálini hjá ymsu vinnunum ikki sampakka. Loyvismyndugleikarnir eiga tí í síni viðgerð at inndraga øll áhugamálini á ítøkiliga firði og gera sínar metingar av teim avleiðingum, sum ein broytt loyvisstøða gevur, áðrenn avgerð verður tikin. Hesa meting hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan gjørt.

Vinnukærunevndin metir, at hummara-virksemið bert í lítlan mun verður ávirkað av broytingini í aliloyvinum, og at hummarabátarnir hava góðar møguleikar at tillaga sítt fiskarí á fjørðinum.  Hinvegin hava alibrúkini eitt greitt áhugamál at fáa loyvi frá myndug-leikanum at staðseta alibrúkini soleiðis, at freimleiðslan er tryggjað optimalt mótvegis sjúku.

# Landsverk

## Serkøn

- Boði Haraldson - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Katrin Joensen - tekniskur assistentur og landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Pætur Joensen - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir
- Óli Johansen - landmátingarteknikari og serkønur limur viðvíkjandi lóg um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál og lóg um landsvegir

## 6 avgreidd mál




### Avvíst mál

1 mál varð avvíst, tí tað fall uttan fyri heimildarøkið hjá kærunevndini at taka støðu til avtalu, sum viðkomandi var í fer við at gera við Landsverk um keyp av ogn. Bleiv avtalan ikki til nakað, og Landsverk tók avgerð um ognartøku, kundi Vinnukærunevndin taka støðu í tí málinum.

3 mál vóru avvíst, tí talan var ikki um fyrisitingarligar avgerðir, men um hoyringssvar og kundu tí ikki kærast til Vinnukærunevndina. Tað er eitt lógarfest krav, at kommuna í sambandi við viðgerð av byggiloyvum skal senda Landsverk ein fyrispurning um, hvørt nakað er til hindurs fyri, at kommunan kann geva byggiloyvi. Talan er um lógarkravda hoyring, sum kommunan er áløgd at fylgja. Tílíkt ummæli frá Landsverk er partur av kommunalu byggimálsviðgerðini og eini møguligari kæru um niðurstøðuna hjá kommununi og kann ikki kærast til Vinnukærunevndina.

# Jarðfeingi

## Serkøn

- Bogi Bech Jensen - serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Petur í Króki - sterkstreymsverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurd Lamhauge - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni
- Sigurð í Jákupsstovu - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni

## 5 avgreidd mál




## Loyvi at framleiða el úr vindorku

Vinnukærunevndin staðfesti avgerð hjá Jarðfeingi at geva S loyvi at framleiða el úr vindorku.

Nevndin metti, at mannagongdin hjá Jarðfeingi sambært § 5, stk. 3 í elveitingarlógini liggur innan fyri karmarnar av lógini, og tað sama er galdandi í mun til tey metingarstøði og vektingina av hesum, sum Jarðfeingi hevur nýtt í samband við avgerðina. Hóast ógreiðleikar eru í mun til einstakar umstøður í málinum, kann ikki vísast á slíkar umstøður, sum hava við sær, at grundarlag er fyri at broyta avgerðina hjá Jarðfeingi.

Metingin av S og V er sera jøvn burtursæð frá einum metingarstøði, sum er prísurin. Her er S greitt betri enn V, og orsøkin er einamest at finna í tí lægra íløgukostnaðinum hjá S, sum aftur er grundaður á tilboðið frá leverandørinum.

# Tryggingareftirlitið

## Serkøn

- Laila Mortensen - cand. act. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingar-virksemi
- Ole Haugaard Nielsen - aktuar og serkønur limur viðvíkjandi lóg um tryggingar-virksemi

### Afturkallað

1 mál var um avgerð hjá tryggingareftir-litinum, men var hetta málið afturkallað.

Vinnukærunevndin fevnir eisini um niðanfyri nevndu øki, men í 2013 hevur nevndin ikki viðgjørt kærur innan hesi øki.

# Arbeiðseftirlitið

## Serkøn

- Ebba Mortensen - kemiverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðs-umhvørvislógini
- John Mikkelsen - maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðsumhvørvis-lógini
- Jóngerð Biskupstø - fysioterapeut og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðs-umhvørvislógini
- Róðin Mellemgaard - maskinmeistari og serkønur limur viðvíkjandi arbeiðs-umhvørvislógini

# Fjarskiftiseftirlitið

**Serkøn**

- Knud Erik Skovby - professari og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Rannvá Sólheim - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Sigurjón Ingvason - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini
- Una Joensen - cand. oecon. og serkønur limur viðvíkjandi fjarskiftislógini

# Kappingarráðið

**Serkøn**

- Herman Oskarsson - cand. polit. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Ingunn Eiriksdóttir - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Sigurd Poulsen - serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini
- Sigurð Ó. Vang - cand. merc. jur. og serkønur limur viðvíkjandi kappingarlógini

# Posteftirlitið

**Serkøn**

- Hjørdis Gaard - cand. scient. pol. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Marja Lamhauge - framleiðsluverkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Sigurjón Ingvason - cand. jur. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi
- Vivi Egholm - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi lóg um postvirksemi

# Skráseting Føroya

**Serkøn**

- Árni Ellefsen - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Birita S. Samuelsen - advokatur og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Brynleif Poulsen - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini
- Vivi Egholm - cand. merc. aud. og serkønur limur viðvíkjandi vinnufelagslógunum, ársroknskaparlógini og grannskoðanarlógini

# Sjóvinnustýrið

**Serkøn**

- Edvard Bjarnason - serkønur limur viðvíkjandi loðslógini
- Klæmint Østerø - verkfrøðingur og serkønur limur viðvíkjandi loðslógini

# Setanarprógv

**Serkøn**

- Anna Borg Dahl - cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Alfred Petersen - advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Andrias Ziska - cand. jur. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Jan Mortensen - MSc. Eng. og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Maria á Dul - MAP og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum
- Páll Nielsen - advokatur og serkønur limur eftir lóg um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum

# Gjald fyri kærur

Vísandi til § 7 í kunngerð nr. 78 frá 28. august 2008 um vinnukærunevnd er gjald ásett fyri viðgerð av ávísum kærum til Vinnukærunevndina. Kostnaðurin fyri kæruviðgerð er settur til kr. 4.000, uttan tá kæran viðvíkur viðurskifti, sum ikki hava samband við tað aktuella ella framtíðar vinnuvirksemið hjá viðkomandi, sum kærir. Í slíkum førum er kostnaðurin kr. 2.000.

Í 2013 er gjald á kr. 4.000 rindað 1 ferð.

# Val av serkønum nevndarlimum

Á flestu økjum eru nú fleiri enn tveir serkønir limir valdir til Vinnukærunevndina og ber nú til hjá formanninum at avgera, um 2 ella 4 serkønir limir skulu viðgera einstøku málini, og eisini hvørjir av teimum serkønu skulu tilnevnast. Við hesum ber til at taka hædd fyri møguligum gegnistrupulleikum.

# Nýtt øki hjá nevndini

Í 2013 varð øki hjá Vinnukærunevndini víðkað við, at avgerðir hjá Sjóvinnustýrinum eftir kunngerð nr. 152 frá 18. desember 2012 um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal v.m. kunnu leggjast fyri Vinnukærunevndina.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri øll avgreidd mál hjá Vinnukærunevndini í 2013 var knappar 4 mánaðir. Hetta eru 2 mánaðir styttri enn miðal viðgerðartíðin undanfarna ár.

Ein slík viðgerðartíð má metast at vera góð fyri hetta slagi av málum og kann neyvan styttast, tá atlit skal takast til ummælis- og hoyringsfreistir.

# 9. Psykiatriska sjúklingakærunevndin

## Nevndin

Limir í Psykiatrisku sjúklingakærunevndini eru

- Nella Festirstein - løgfrøðingur, formaður í nevndini
- Kaj Kallsberg - fyrrv. kommunulækni, og pr. okt 2013 Elsubeth M. Fossadal, lækni
- Sámal Lindenskov - sálarsjúkrarøktari

## Viðgerðarøkið

Kærast kann til Psykiatrisku sjúklinga-kærunevndina um persónur í samband við innlegging á psykiatrisku deild verður útsettur fyri tvingsil.

## Virksemið í 2013

Í 2013 vóru 3 kærur latnar Psykiatrisku Sjúklingakærunevndini. Hetta er munandi minni enn í 2012, men meira líkt 2010 og 2011, tá ávikavist 3 og 5 kærur vóru móttiknar.

Hvør kæra til Psykiatrisku sjúklingakæru-nevndina inniheldur ofta kærur um fleiri ymisk tvingsilsinntriv og so var eisini hetta árið. Í teimum 3 kærunum varð kært um tilsamans 6 tvingsilsinntriv. Hetta er munandi minni enn øll árini frammanundan.

**3**

**Nýggj mál**

## Kærumálini, sum vórðu avgjørd, vóru av hesum slagi

Kærunevndin hevur hildið 3 fundir í 2013 og tók støðu til 6 tvingsilsinntriv. Kærunevndin avgjørdi at góðkenna øll hesi tvingsilsinntrivini.

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 3 | 4 | **1** |
| Tvingsilsfastspenning | 2 | 1 | **1** |
| Tvingsilsafturhald | 3 | 2 | **2** |
| Bráðfeingis sissandi heilivág | 1 | 2 | **1** |
| Fasthaldan | - | - | **1** |
| **Í alt** | **9** | **9** | **6** |

## Tvingsilsfyriskipanir á Psykiatriska Deplinum í 2013

Psykiatriski depilin hevur upplýst fyri Føroya Kærustovni, at frá 1. januar til 31. desember 2013 hava 54 tvingsilfyriskipanir verið tilsamans. Sjúklingaráðgevar hava verið tilnevndir 30 ferðir í 2013.

| | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|
| Tvingsilsinnlegging | 7 | 12 | **10** |
| Tvingsilsfastspenning | 9 | 14 | **13** |
| Tvingsilsafturhald | 11 | 12 | **10** |
| Tvingsilsviðgerð | 1 | 13 | **2** |
| Verjutiltøk | | 1 | **-** |
| Persónlig vernd | | 3 | **-** |
| Beróligandi medisin | | | **17** |
| Fasthaldan | | | **2** |
| **Í alt** | **28** | **55** | **54** |

## Avgreidd mál

Um samanborið verður við 2012 vísa tølini frá Psykiatriska deplinum, at virksemið viðvíkjandi tvingsli er áleið tað sama í 2013.

Vart skal tó gerast við, at í 2013 eru tvingsilsfyriskipanirnar settar upp á ein annan hátt enn undanfarnu ár. Árini 2010 til 2012 eru tølini fyri beróligandi medisin, fasthaldan og tvingsilsviðgerð gjørd upp undir einum, sum tvingsils-viðgerð. Nú síggjast tølini fyri hesar tvingsilsfyriskipanir hvør sær.

Virksemið hjá sjúklingaráðgevunum er eisini áleið tað sama sum í 2012.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin fyri kærurnar hjá Psykiatrisku sjúklingakærunevndini er umleið 7 dagar í 2013.

# 10. Skuldarumskipanarnevndin

## Nevndin

Í Skuldarumskipanarnevndini sita:

- Jógvan Páll Lassen - lógarkønur og formaður í nevndini
- Jógvan Emil Nielsen - roknskaparkønur
- Nella Festirstein - fyrisitingarkønur

## Viðgerðarøkið

Nevndin viðger umsóknir um umskipan av almennari skuld.

## Móttikin mál

Í 2013 komu 28 mál inn til Skuldarumskipanarnevndina. Hetta er júst sama tal av málum sum í 2012, og má talið av umsóknum sostatt aftur sigast at vera á einum meira vanligum støði eftir serliga lága talið av umsóknum í 2011, tá bert 19 umsóknir vóru móttiknar.




**28**

**Nýggj mál**

11 av umsóknunum vóru um ymiska skuld, 7 um skattaskuld, 7 vóru um rentur og 3 um mvg.

## Avgreidd mál

Skuldarumskipanarnevndin hevði 5 fundir í 2013, og vóru 20 mál avgreidd. Hetta eru færri enn undanfarna ár, tá nevndin avgreiddi 35 mál, men fleiri enn í 2011, tá 18 mál vóru avgreidd.

Á talvuni síggjast avgreiddu málini uppbýtt eftir skuldarslagi.

| | 2011 | 2012 | **2013** |
|---|---|---|---|
| Ymisk skuld | 4 | 14 | **6** |
| Skattaskuld | 7 | 8 | **7** |
| Mvg | 3 | 4 | **3** |
| Tollur | - | - | **-** |
| Vinnulán og veðhaldslán | - | 2 | **-** |
| Lestrarlán | 1 | 1 | **-** |
| Rentur | 3 | 6 | **4** |
| Framleiðslu-, AM- og lønarhæddaravgjald | - | - | **-** |
| **Í alt** | **18** | **35** | **20** |

## Avgreiðslan

| | 2011 | 2012 | **2013** |
|---|---|---|---|
| Full ella lutvís eftirgeving | 7 | 10 | **8** |
| Veita gjaldsskáa | 2 | 7 | **2** |
| Steðga rentutilskriving | | 2 | **-** |
| Víst til Skiftirættin, ella privata loysn | 2 | 1 | **1** |
| Umsókn ikki gingin á møti | 4 | 8 | **3** |
| Burturfallin mál | 3 | 7 | **6** |
| **Í alt** | **18** | **35** | **20** |

# Eftirgivin skuld

Skuldarumskipanarnevndin eftirgav í alt umleið kr. 5.946.001 í 2013. Skuldin er uppbýtt soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| • Rentuskuld | uml. kr. | 1.635.402 |
| • Vinnu- og veðhaldslán | uml. kr. | 0 |
| • Lestrarlán | uml. kr. | 0 |
| • Mvg-skuld | uml. kr. | 2.947.867 |
| • Landsskattur | uml. kr. | 1.362.732 |

Tað er torført at seta upp nágreinilig tøl um eftirgevingar, tí ymiskar umstøður gera, at tølini ofta broytast eitt sindur. Rentuskuldin broytist t.d. alla tíðina. Hini tølini kunnu vera broytt eitt sindur, frá tí umsóknin kom inn, til avgerðin varð tikin av nevndini.

Í málunum, har nevndin hevur samtykt ikki at ganga umsóknini á møti, hevur talan í nógvum føri verið um mál, har skuldin er lítil sæð í mun til ogn og inntøku hjá persóninum, ella at umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn. Taks hevur eisini í nøkrum førum trygt veð fyri skuldini.

Í 2013 vóru ongar avgerðir tiknar í bólkinum framleiðslugjald, tollur og lønarhæddaravgjald, vinnu- og veðhaldslán og lestrarlán.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2013 var 7 mánaðir og 24 dagar og er sostatt stytt við 1 mánaða í mun til 2012.

Hóast stytt, er viðgerðartíðina á hesum øki enn nakað long, og strembað verður eftir at stytta um hana.

Spurningurin er tó, hvussu nógv tað ber til at stytta um hana, tí orsøkin til viðgerðartíðina er ikki so einføld, men ein samanseting av fleiri faktorum.

Mannagongdin í hesum málum er tann, at umsóknarblað um eftirgeving verður sent Kærustovninum, og innheintar stovnurin upplýsingar um skuldina frá TAKS ella Studna alt eftir, um talan er um lestrarskuld ella aðra skuld. Er kommunuskattur partur av skuldini, sum søkt verður um eftirgeving fyri, hevur Skuldarumskipanarnevndin ikki heimild at taka støðu til hendan partin av skuldini. Heimildin at eftirgeva kommunuskatt liggur hjá kommununum, og áðrenn Skuldarumskipanarnevndin tekur støðu, verður umsóknin send til avvarðandi kommunu til støðutakan av hesum partinum.

Av teimum 20 viðgjørdu málunum í 2013 skuldu kommunur taka støðu til kommunuskattaskuld í 8 málum, og var viðgerðartíðin hjá kommununum í 2013 í miðal 2 mánaðir og 24 dagar. Hetta er væl styttri enn í 2012, tá viðgerðartíðin hjá kommununum í miðal var 5 mánaðir og 22 dagar.

Hinvegin var ummælistíðin hjá Taks longd nakað í 2013 og var í miðal 1 mánaði og 13 dagar í 2013. Í 2012 var miðal ummælistíðin hjá Taks 3 vikur.

Ein onnur orsøk til longu viðgerðartíðina á hesum økinum er, at tað kann taka drúgva tíð at fáa upplýsingarnar frá umsøkjarunum og í summum førum enda mál, tí umsøkjarin ongantíð kemur við neyðugu upplýsingunum. Hetta kann tó ikki gerast, fyrr enn hálvt ár er runnið, og umsøkjarin fleiri ferðir er mintur á at koma við hesum upplýsingum.

### Viðmerkingar:

Kærustovnurin fer enn einaferð at vísa á, at viðgerðarmannagongdin, sum er neyðug fyri at fylgja ásettu lógarkrøvunum fyri skuldarumskipan, er tung og virkar nakað stirvin, tá talan er um minni skuld. Mett verður, at skipanin hevði verið meira fleksibul og lættari at umsitið, um t.d. Taks hevði heimild at eftirgivið minni upphæddir, og at gjørt rentufríar gjaldsavtalur av skuld upp til t.d. kr. 50.000,00.

# 11. Fjølmiðlanevndin

## Nevndin

Í Fjølmiðlanevndini sita:

- Súsanna Nordendal - løgfrøðingur og forkvinna
- Ingolf S. Olsen - tíðindafólk
- Eirikur Lindenskov - blaðstjóri
- Halgir Winther Poulsen - advokatur

## Viðgerðarøkið

Kærunevndin viðger kærur um:

- Brot á góðan fjølmiðlasið og
- Rættinum at svara aftur, undir hesum skylduna til at almannakunngera eitt aftursvar, og spurningum um innihald, snið og staðseting

### Móttikin mál

Í 2013 eru 10 kærur latnar Fjølmiðla-nevndini.

**10**

**Nýggj mál**

### Avgreidd mál

Fjølmiðlanevndin hevði 9 fundir í 2013 og avgreiddi tilsamans 9 kærumál.

Í 2013 vóru 4 kærur um góðan fjølmiðlasið og ein av hesum var eisini um rættin at svara aftur.

1 umbøn var til nevndina um at taka mál upp til viðgerðar, og hetta bleiv viðgjørt sum ein spurningur, um grundarlag var fyri at taka mál upp til viðgerðar av sínum eintingum.

1 umbøn um uppafturtøku av eini avgerð hjá nevndini, og hendan varð sýtt. 1 mál var avvíst, tí kært var ov seint, og 1 mál var avvíst, tí nevndin ikki hevði málsræði at viðgera málið.




## Avgreiðslan

Av 9 avgreiddum málum hevur nevndin givið viðhald í tveimum málum um, at góður fjølmiðlasiður ikki er hildin, og í einum av hesum er rætturin at svara aftur heldur ikki hildin. Viðhald er ikki givið í tveimum málum.



## Viðmerkingar

Málini í 2013 hava verið fjølbroytt og tí ber ikki til at gera yvirskipaðar viðmerkingar til hesi. Ei heldur hava verið mál av týdningi, sum geva nevndini høvi at gera serliga viðmerkingar til hesi.

Fjølmiðlanevndin kann sambært § 44, stk. 1 í fjølmiðlaábyrgdarlógini í serligum førum taka mál upp til viðgerðar av sínum eintingum, um málið hevur serligan týdning. Nevndin fekk áheitan frá ónevndum borgara, sum heitti á nevndina um at viðgera eina grein um ein annan persón, tí hann helt, at greinin var so ódámilig og haturskend. Fjølmiðlanevndin metti, at greinin viðvíkur ikki viðurskiftunum, ið metast at hava tílíkan serligan týdning, at hon skuldi taka hetta upp av sínum eintingum og gjørdi ikki meira við málið. Í slíkum málum tekur nevndin hædd fyri, at persónar eru, sum kunnu kæra, men hava ikki gjørt tað. Eitt atlit handan slíkari meting er, at tá persónar eru sum kunna kæra, men ikki hava gjørt tað, er hetta møguliga tí tey heldur vilja lata hetta fara framvið enn at fáa hetta umrøtt enn einaferð, tá ið kæran skal viðgerast og kanska umrøðast umaftur í miðlunum.

Vart skal annars gerast við, at kærufreistin til Fjølmiðlanevndina má metast at vera ov stutt, serliga við atliti til, at talan er um mál hjá borgarum mótvegis miðlum, har miðlarnir ikki hava vegleiðingarskyldu í mun til kærumøguleikar. Hetta merkir, at um ein borgari kennir seg illa viðfarnan av einum miðli, veit hesin borgarin ikki neyðturviliga, hvørjar møguleikar hann hevur í mun til at kæra. Tað er ivasamt, um tað er rímiligt, at kærufreistin í slíkum førum er tann sama, sum tá borgarar hava eitt viðurskifti við ein myndugleika, sum hevur vegleiðingarskyldu í mun til kærumøguleikan.

Til samanberingar kann nevnast, at í Danmark hevur kærufreistin eisini verið 4 vikur, men er nú tann 1. januar 2014 longd til 12 vikur.

## Viðgerðartíðin

Miðal viðgerðartíðin í 2013 var gott 5 mánaðir.

Ein viðgerðartíð á 5 mánaðir verður mett at vera nakað long á einum øki sum hesum. Um viðgerðin í fjølmiðlunum ikki hevur verið nøktandi, verður tað mett at vera av stórum týdningi, at kærari ikki bara kann fáa almenna uppreisn, men eisini, at hetta verður skjótast gjørligt, meðan málið enn er nøkunlunda feskt í minninum hjá fjøldini. Arbeitt verður tí við at stytta viðgerðartíðina á hesum øki. Tó skal sigast, at styttri viðgerðartíð enn 3 mánaðir er neyvan realistisk. Báðir partar í málinum, kærarin og fjølmiðilin, skulu hava møguleika fyri at koma við teirra sjónarmiðum og eisini at gera viðmerkingar til sjónarmiðini hjá hinum partinum, áðrenn avgerð kann takast.

# www.kaerustovnur.fo




Á heimasíðuni hjá Føroya Kærustovni finnur tú upplýsingar um virksemið okkara.

Her eru upplýsingar um nevndirnar, nær næsti fundur verður og her ber eisini til at leita í avgerðarsavni eftir avgerðum, sum nevndirnar hava tikið.

www.kaerustovnur.fo

Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur
undir Løgmansskrivstovuni.

Kjarnuuppgávan er at vera skrivstova
hjá kærunevndum, sum viðgera avgerðir
hjá almennum myndugleikum.

Stovnurin fyrireikar mál til 8 nevndir.

Føroya Kærustovnur | Undir Hornabakka | Postsmoga 45 | 110 Tórshavn

Telefon 32 05 85 | Telefax 32 05 90 | www.kaerustovnur.fo

C4designit.com